52-083/2019

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 83/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, um hjálp til ferðavinnu og fyribyrging av arbeiðsloysi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1) Nær kemur hjálpin til ferðavinnuna og aðrar sperdar vinnur?
2) Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at tryggja, at fleiri hópuppsagnir ikki verða?
3) Hvussu ætlar landsstýrið at forða fyri vaksandi arbeiðsloysi?
4) Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið fyri at tryggja, at fyritøkur ikki fara á húsagang orsakað av korona?
5) Er ætlanin at leingja skipanina við ALS og stuðli til rakstur fyri serliga útsettar vinnur, so sum ferðavinnuna?
6) Eru ætlanir um at veita hjálp, til dømis endurgjald fyri part av mistari inntøku ella rentufrítt lán, til fyritøkur, sum hava mist stóran part ella alt inntøkugrundarlagið í rúma tíð orsakað av korona?

Svar:
Til nr. 1
Í landsstýrinum verður arbeitt við ítøkiligum uppskotum um at veita ferðavinnuni hjálp.

Mett verður, at hesi uppskot hava við sær, at ferðavinnufyritøkurnar kunnu klára seg ígjognum koronakreppuna og vera klárar, tá ið gongd aftur kemur á ferðavinnuna.

Ætlanin er at leggja ætlanirnar hjá landsstýrinum fram fyri almenninginum seinni í hesari vikuni og at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið í komandi viku.

Til nr. 2
Fleiri fyritøkur hava seinastu tíðina mett tað verða neyðugt at siga fólki úr starvi fyri at tillaga virksemið til givnu umstøðurnar. Hjálparpakki 1 spenti eitt trygdarnet undir løntakarar og arbeiðsgevar og var ætlaður at forða fyri ógrundaðum hópuppsagnum vegna óvissuna um framtíðarútlit grundað COVID-19.

Nú samfelagið er farið upp aftur í ferð, og framtíðarvánir eru meira greiðar, síggja vit, at fyritøkur tillaga virksemið. Hetta eru natúrligar tillagingar á arbeiðsmarknaðinum.

Serliga trupul er tó stoðan í ferðavinnuni. Samfelagið er enn afturlatið mótvegis ferðafólki úr útlandinum, og hóast stuðul verður latin til hesa vinnu, er neyðugt hjá ferðavinnufyritøkunum at tillaga virksemið til nýggja veruleikan. Í eini slíkari kreppustøðu slepst tíverri ikki undan, at tað eisini verða

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

uppsagnir. Hesum fær landsstýrið ikki forða fyri, men arbeiðir fyri at gera hjálparpakkar til ferðavinnuna, sum hava sum endamál, at ferðavinnufyritøkur yvirliva og eru klárar at seta fólk aftur í starv, tá landið verður latið uppaftur mótvegis útlandinum. Vónandi verður hetta um ikki so langa tíð, soleiðis at ferðavinnan fær bjargað einum parti av verandi ferðavinnuári.

Til nr. 3 - 6
Eingin veit, hvussu long koronakreppan verður. Føroyar, eins og onnur lond, byrja so spakuliga at lata uppaftur. Hetta verður gjort varliga og við virðing fyri heilsutilmælum, soleiðis at smittan vónandi ikki av álvara tekur seg upp aftur. Ferðavinnan er serliga hart rakt, tí fólk ikki kunnu ferðast frítt til Føroyar, og tað er ollum greitt, at ferðavinnan verður fyri stórum tapi í ár.

Um stórir partar av ferðafyritøkunum fara av knóranum, kann tað verða trupult hjá ferðavinnuni at koma í gongd aftur, men allir partar av vinnuni verða ikki eins hart raktir. Nakrir partar kunnu skjótt byggjast upp aftur, men aðrir kunnu moguliga missa vitan og netverk, sum tað tekur drúgva tíð at byggja upp aftur.

Landið eigur tí at veita ferðavinnuni stuðul, soleiðis at tað slepst undan, at stórur partar av ferðavinnuni fer av knóranum. Tað hevur týdning at tryggja, at vinnan framhaldandi er til, tá gongd aftur kemur á ferðavinnuna.

Kronakreppan og afturlatingin av samfelagnum kom brádliga inn á okkum, og ætlanin við hjáparpakka 1 og 2, undir hesum tíðaravmarkað COVID-19 stuðulsskipan undir ALS og stuðul til fastar útreiðslur, var m.a. at forða fyri, at fyritokurnar fóru at siga fólki úr starvi í óðum verki.

Stuðulspakkarnir, sum higartil eru settir í verk, fevna breitt um allar vinnufyritøkur og fevna um tíðarskeiðið 1. apríl 2020 til 30. juni 2020. So hvørt sum myndugleikarnir hava latið samfelagið uppaftur, eru nógvar fyritøkur, sum orsakað av Covid-19 vóru noyddar at leggja virksemið niður, farnar aftur til verka. Alt fleiri starvsfólk fara tí úr lønarískoytisskipanini hjá ALS. Tá flest vóru í hesi skipan, tann 4. apríl 2020, vóru 4320 fólk í skipanini. Tann 25. mai 2020 var hetta talið 2266.

Tann 12. mars 2020 vóru slakir 300 móttakarar av arbeiðsloysisstuðli. 25. mai 2020 var talið 441.

Verður roknað við, at oll tey, sum í dag eru í lønarískoytisskipanini hjá ALS, fara yvir í vanligu arbeiðsloysistryggingina, verður mesta arbeiðsloysið umleið 11%. Hetta er tó, sum gongdin higartil vísir, lítið sannlíkt. Meira sannlíkt er, at umleið helvtin av teimum, sum eru í lønarískoytisskipanini hjá ALS, í eitt tíðarskeið fara yvir í vanligu arbeiðsloysistryggingina. Í tí førinum verður mesta arbeiðsloysi umleið 6%.

Eisini 6% arbeiðsloysi er ov høgt. Men væntað verður, at talan ikki gerst um varandi støðu. Tá koronakreppan er av, og tað aftur er komin meira ferð á samfelagshjólini, verður væntandi talan um, at fyritøkur aftur fara at seta fólk í starv. Føroyskt vinnulív er grundleggjandi væl fyri at standa ímóti hesi kreppuni. Landsstýrið fylgir tó gongdini, og vísir tað seg, at gongdin verður oðrvísi og verri enn væntað, kunnu fleiri tiltøk koma uppá tal seinni.

Í Tinganesi, 26. mai 2020

Bárður á Steig Nielsen
logmaður